# Vælsignað fáið oljuna upp

**Eingin forðing hevði verið at fingið oljuna úr Olshanu, heldur ikki eftir, at maskinrúmið fyltist við sjógvi, tí úttøk vóru á dekkinum at fáa oljuna upp ígjøgnum, segði skiparin á Olshanu, Yuriy Matveen undir sjófrágreiðingini í morgun**

SKIPSVANLUKKA
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*


*Skiparin á Olshana á veg úr Rættinum saman við tveimum av umboðsmonnunum á Faroe Agency*

Mynd: Jens Kristian Vang

Eg heitti ferð eftir ferð á føroysku myndugleikarnar at fáa oljuna upp úr skipinum, men svarið var, at teir fingu ikki herbergað henni, og tí varð hon verandi umborð, segði Yuriy Matveen, skipari á Olshanu undir sjófrágreiðingini í morgun.

Avhoyringin av skiparanum varð rættiliga drúgv, hon byrjaði klokkan gott átta í morgun og var ikki av fyrr enn farið var av hálvgum tólv.

Skiparin Yuriy Matveen greiddi frá, at teir vóru komnir undan Íslandi við 257 tonsum av fiski, og lógu á reduni í Havn undan Ólavsøku. Eftir høgtíðina fóru teir inn á Kollafjørð at leggja veiðina upp. Í tí sambandi sendi Havnarskrivstovan loðsin, Asbjørn Heinesen umborð, og hann loðsaði Olshanu innar á Kollafjørð.

Tá lastin var løgd upp á frystihotellinum, skuldi skipið eftir ætlan til Havnar aftur at bunkra olju, men av tí at teir ikki sluppu framat í Havn, varð gjørt av at bunkra í Kollafirði. Bunkrað vóru 270 tons av olju, og saman við teimum 30 tonsunum, ið vóru í skipinum, var Olshana fult bunkrað.

Hartil kom so eisini eini tíggju tons av smyrji- og hydraulikkolju, so tilsamans hevði Olshana 310 tons av olju umborð, tá teir fóru av Kollafirði hóskvøldið 2. august um 18.40-tíðina.

Teir høvdu ikki biðið um loðs, men skiparin metti tað vera frægast at halda somu leið út aftur, sum teir komu inn við loðsinum. Men neyvt somu leið hava teir ikki hildið, tí um 19.15 tíðina stóð Olshana á flesjunum.

## Trettan ár umborð

Skiparin greiddi frá, at hann hevði skiparaprógv og hevði ført Olshanu í trettan ár. Hetta er aðru ferð, at Yuriy Matveen er í Føroyum, og hann helt seg vera ivaleysa langt frá flesjunum, tá teir fóru av Kollafirði hetta kvøldið.

Skiparin tosaði í »kápillongdum«, ein longd, sum svarar til ein tíggindapart av einum fjórðingi. Tá teir sigldu inn á Kollafjørð vóru teir umleið fýra kápillongdir vestan fyri flesjarnar, og á veg út aftur vóru hann og stýrimaðurin samdir um, at halda seg tríggjar kapillongdir vestanfyri. Tá Olshana stoytti, vóru teir sambært skiparanum 2,46 kápillongdir vestanfyri flesjarnar.

Oljan var goymd í 12 ymiskum tangum, og semja var millum skipara og maskinmeistara um, at hol helst rættiliga skjótt ert komið á tanga nummar átta. Tó segði skiparin, at olja ikki sivjaði úr skipinum beinanvegin.

Eftir stoytin gav skiparin beinanvegin boð um at kanna skrokkin á skipinum, og innan fimm minuttir hevði hann sent út neyðarkall.

Tjaldrið var rættiliga skjótt á staðnum, og eisini ein annar bátur, sum skiparin segði líktist einum sleipibáti. Hesin hevði oljusperringar á dekkinum, men hóast skiparin á russiska skipinum segði seg beinanvegin heita á føroysku bjargingarliðini um at fáa lagt hesar út, men kortini gingu fleiri tímar, áðrenn hetta hendi.

## Oljuna úr skipinum

Hóast skiparin tosaði russiskt undir sjófrágreiðingini, so var samskiftið millum hann og føroysku myndugleikarnar farið fram á enskum hetta kvøldið og náttina. Men hetta hevði ikki borið nakrar trupulleikar við sær.

Tá talan gjørdist um at royna at fáa skipið av flesjunum aftur, heitti russiski skiparin enn einaferð á myndugleikarnar um ikki at gera nakra roynd í so máta, áðrenn oljan var tømd úr skipinum.

Tað var púra greitt fyri mær, at minsta óróð kundi skaða skipið og orsakað ein oljuleka. Tí var tað í mínari verð átroðkandi neyðugt at fáa pumpað oljuna úr Olshanu. Bæði tí at vandin fyri umhvørvisdálking var so stórur, men eisini tí at skipið hevði lætnað eini 300 tons, varð oljan pumpað úr, segði skiparin.

Men eingin var at taka ímóti oljuni úr russiska skipinum, og tí gjørdist endin tann, at Olshana at enda varð skrykt av flesjunum við tí úrsliti, at hon sakk.

Sambært skiparanum hevði tað verið møguligt heilt til tað síðsta at fingið oljuna upp, tí úttøk vóru á dekkinum, sum oljan kundi verið pumpað upp ígjøgnum, eisini hóast maskinrúmið var fylt við sjógvi.

Hinir russisku sjómenninir vóru eisini avhoyrdir í morgun, og teir kundu bert vátta frágreiðingina hjá skiparanum.

---

# Strandferðslan spennir bein fyri ovastevnu

**- Tað tykist næstan sum leiðslan í Strandferðsluni ynskir at spenna bein fyri stevnuni, siga fyriskipararnir av ovastevnu. Orsøkin er órimiligar prístreytir fyri leigu av skipum umframt príshækkanin á ferðaseðlum við Rituni**

OVASTEVNA
*Finnur Jensen*
*finnur@sosialurin.fo*

Fyriskipararnir av ovastevnu eru stak ónøgdir við Strandferðsluna. Orsøkin er tann órímiliga høgi prísurin, sum Strandferðslan hevur sett fyriskiparunum fyri leigu av annaðhvørt Ternuni og Sam. Av tí at Ritan ikki loyvir bilflutning, er sera nógv baks av at flyta og landa alla fragtina, so sum ljós- og ljóðútgerð, ið kemur úr Havnini til oynna. Tí varð semja gjørd við Strandferðsluna um at leiga antin Ternuna ella Sam.

- Hetta kostar 2.500 kr. at leiga um tíman. Og tað er eisini í lagi, vit men nú vísir tað seg, at vit skulu leiga bátin allan vegin úr Klaksvík. Tað tekur 6 tímar og kostar sostatt 15.000 krónur. Tað hava vit ikki ráð til, sigur Jákup av Skarði, formaður í stuðulsnevndini fyri svimjihyl í Nólsoy.

Hetta fekk fyriskiparin úr Nólsoy at vita frá stjóranum í Strandferðsluni, Regini Vágadal, í telefonsamrøðu mánadagin.

Nólsoyingar skulu harumframt rinda 20.000 kr fyri at fáa Rituna og Silju Star at sigla eykatúrar til allar stevnugestirnar. Og sambært fyriskiparanum ætlar Strandferðslan enntá at hækka prísin á ferðaseðlum úr 40 krónum upp í 100 krónur.

- Tað tykist næstan sum leiðslan í Strandferðsluni ynskir at spenna bein fyri stevnuni, leggur Jákup av Skarði afturat.

Sosialurin ætlaði at fáa viðmerkingar frá Regini Vágadal, stjóra í Strandferðsluni, men hann var á fundi fram til døgurða, tá deadline er.